VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Lot til andøvsgul av landsynningi og sólglottar, men eisini sirm ella mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 15 stig.

Veðrið sunnudagin og Ólavsøkuaftan:
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, seinni mest av vestri. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 11 og 15 stig.

Kongur á politiskum fundi

Jú, kongur kom veruliga á politiskan fund í Krabburð. Í skapi av einum deyðum hundi, sum eigarin, ið var sambandsmaður, hevði kallað upp eftir einum deyðum kongi

SJÓNLEIKUR
Edvard Joensen

Eisini Balteus gamli leitaði sær á politiskan fund í Krabburð

Mynd: Jens Kristian Vang

So koma teir umsíðir á pall. Originalarnir úr Krabburð, sum ikki eru so øgiliga originalir kortini. Vit síggja teir aftur um alt landið. Hvørki meira ella minni.

Gríma fer leygarkvøldið klokkan 19.00 fyrstu ferð á pall við leiki, sum settur er saman av trimum søgum úr bókini Gamansleikur hjá Jens Paula Heinesen. Tveir leikarar eru. Hans Tórgarð og Bárður Persson. Súsanna Tórgarð leikstjórnar. Fimm sýningar verða í fyrsta umfari fram til ólavsøkudag. Framførslurnar eru á Gamla Meiaríi í Havn.

Leikararnir siga, at leikurin er settur so lætt upp, at einki er til hindurs fyri at ferðast við honum.

Teir hava úr at gera, allir originalarnir í Krabburð. Teir skulu hava kongavitjan, fáa nýtt skip og so sanniliga eisini á politiskan fund í dansistovuni. Og tað spælir ikki alt líka væl av. Men tað verður ikki keðiligt.

Nei, tað er ikki lukkuligt at vera sambandsmaður í Krabburð, tá kongur kemur á vitjan. Hóast hann hevur fingið greið boð frá læknanum um, at hann má fyri alt í verðini ikki fara ov langt niðan frá gørðunum, tí hann ikki tolir hæddir, er Tarnovius farin upp á takið at tjøra. Tað er neyðugt, nú Hansara Háting kemur framvið.

Men tað argar hann øgiligt, at hatta spottið Abraham nú knappliga skal hava slíka umsorgan fyri rótakálinum, bara tí kongur kemur. Eitt slíkur apukattur, sum annars einki leggur í kong.

Men verri er við Jensi, tjóðveldismanninum, sum hevur keypt ein heilan kassa av dynamitti at spreingja kongin við.

Og lítið mætari er skilið, tá teir fara á politiskan fund, og allir skulu hava orðið. Fyri ikki at tala um, tá teir fingu skip.

Teir báðir, Hans og Bárður, hava, ótilvitað siga teir, fingið lagt ávísar persónar, sum áskoðarin væl kann seta navn á, inn í leikirnar.Og tað ger avgjørt ikki leikin verri.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	10
Nuuk	11
Qaqortoq	10
Ammassalik	8
Saint John's	23
Halifax	18
Reykjavík	14
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	12
Lerwick	16
Aberdeen	21
London	22
Tromsø	21
Bergen	14
Oslo	--
Stokkhólm	22
Keypmannah.	21
Helsinki	24
Moskva	25
Berlin	28
Warzawa	30
Kiev	25
Bukarest	31
Paris	25
Madrid	29
Róm	--
Malorca	32
Athen	32
Malta	33
Tunis	36
Beijing	26
New Dehli	33
Bangkok	27
Jakarta	32
Sydney	20
New York	23
Miami	27
Los Angeles	22
Meksikobýur	--
Panama	33
La Paz	14
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	11

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 997 hPa. við Írland fer norðureftir og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósmorgunin.

Í dag:
Lágtrýstið vestan fyri Føroyar fer móti Íslandi. Lágtrýstið sunnan fyri Írland fer í landnyrðing.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 22/07 kl. 06⁰⁰– 23/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,3°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,5 mm – mált frá 22/07 kl. 06⁰⁰–23/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 53,5 mm

VESTFALLSKYRRINDI

10. juli: Mánin næstur jørðini
13. juli: Full sól
21. juli: Seinna kvarter
22. juli: Mánin longst frá jørðini
29. juli: Tendring

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
24. juli	03.47	16.07	02.47	15.07	03.02	15.22	05.47	18.07	06.47	19.07	02.02	14.22	01.02	13.22	04.02	16.22	05.02	17.22	03.32	15.52	04.47	17.07
25. juli	04.28	16.50	03.28	15.50	03.43	16.05	06.28	18.50	07.28	19.50	02.43	15.05	01.43	14.05	04.43	17.05	05.43	18.05	04.13	16.35	05.28	17.50
26. juli	05.13	17.36	04.13	16.36	04.28	16.51	07.13	19.36	08.13	20.36	03.28	15.51	02.28	14.51	05.28	17.51	06.28	18.51	04.58	17.21	06.13	18.36
27. juli	06.01	18.26	05.01	17.26	05.16	17.41	08.01	20.26	09.01	21.26	04.16	16.41	03.16	15.41	06.16	18.41	07.16	19.41	05.46	18.11	07.01	19.26
28. juli	06.51	19.16	05.51	18.16	06.06	18.31	08.51	21.16	09.51	22.16	05.06	17.31	04.06	16.31	07.06	19.31	08.06	20.31	06.36	19.01	07.51	20.16

5 707265 100043 >